

Lars Larsen, stjóri á Flogfelag Føroya, greiðir Anniku Jespersen og Bergtóru Nielsen, flogternum hjá Atlantsflogi, og Dánjali Poulsen, stjóra á Faroe Travel, frá søguni hjá Hotel Vágum



Kári Hentze er í dag leiðari á Hotel Vágum



Millum mongu gestirnar á móttøkuni vóru eisini starvssfólk hjá Atlantsflogi, sum starvast á flogvøllinum



Lossararnir stukku inn á gólvið millum fráferðirnar hjá flogførunum



Bankastjórin og grannskoðarin hittust eisini á Hotel Vágum. Jørn Astrup Hansen og Pauli Ellfsen.

# Móttøka á Hotel Vágum

**Móttøka var fríggjadagin í seinastu viku á Hotel Vágum í samband við, at Flogfelag Føroya herfyri fylti 40 ár og Hotel Vágar 25 ár. Eisini høvdu trý starvsfólk á hotellinum 25 ára starvsdag**

MÓTTØKA

*Orð og myndir*
*Edvard Joensen*

**Hotel Vágar:** Í fjør vóru liðin 40 ár, síðan Flogfelag Føroya varð stovnað, og í mars í ár vóru 25 ár liðin, síðan Hotel Vágar alment varð tikið í nýtslu. Tó hevði okkurt virksemi verið á hotellinum síðan á jólum árið fyri.

Í hesum smabandi var móttøka á Hotel Vágum, har eisini tríggjar av teimum, ið starvast á Hotel Vágum vórðu heiðraðar fyir at hava verið i starvi á hotellinum øll 25 árini, hotellið hevur havt opið.

Sum ein starvsfelagi teirra tók til í heiðursrøðu fyri teimum trimum: »Tað er ikki hvønn dag vit halda 140 ára starvsdag.«

Lars Larsen, sum er annar av stovnarunum av Flogfelag Føroya, sum eisini eigur Hotel Vágar, tók í móti gestum og helt røðu undir hátíðarhaldinum. Hann legði saman við Hugo Fjørðoy í Sørvagi lunnar undir tað virksemið, sum nú hevur vart í 40 ár. Eitt skifti hevði felagið eisini egið flogfar.

Lars Larsen greiddi í røðu síni frá gongdini hesi árini. Og sum hann sjálvur segði, skuldi tað bæði dirvi og eitt sindur av svakligheit til viðhvørt. Men hann er nøgdur við úrlsitið, sum næsta ættarlið nú í stóran mun hevur tikið við.

Trý starvsfólk hava arbeitt á hotellinum øll tey 25 árini, síðan latið varð upp. Tær báðar, Joan Jørgensen og Malja Danielsen, hava verið í køkinum, og Anna Maria Hattarstein hevur serverað og staðið í móttøkuni øll hesi árini. Tær vóðru heiðraðar bæði av leiðsluni og av starvsfeløgum hendan dagin.



Tær tríggjar, sum høvdu 25 ára starvsdag, vóru umframt av leiðsluni, eisini heiðraðar av starvsfeløgunum



# Vandi fyri at skipini hjá Strandferðsluni verða løgd

**– Maskinmeistararnir og fíggjarmálaráðið skulu til samráðingar við semingsmenninir í dag. Klára partarnir ikki at semjast partarnir ikki, verða skipini hjá Strandferðsluni løgd**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er aftur vandi fyri verkfalli á Strandferðsluni.

Maskinmeistararnir hja tí almenna og fíggjarmálaráðið fara í dag at gera eina seinastu roynd at finna semju, so at nýggjur sáttmáli kann gerast.

Eydnast tað ikki, verða øll strandfaraskipini løgd, umframt rannsóknarskipið, Magnus Heinason. løgd. Harafturat fara maskinmeistararnir hjá tí almenna á landi, heldur ikki til arbeiðis.

Tað fer at raka maskinmeistarar á sjúkrahúsunum og øðrum almennum stovnum, har maskinmeistarar hjá tí almenna arbeiða.

Sáttmálin ímillum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið um maskinmeistararnir hjá ti almenna, gekk út í oktober. So kom løgtingsval ímillum og órógvaði samráðingarnar.

Men nú samráðingarnar vórðu tiknar uppaftur, vísti tað seg, at ongin møguleiki var fyri at finna semju.

Sostatt vórðu semingsmenninir boðsendir og teir báðir útsettu eitt møguligt verkfall til á midnátt í annaðkvøld.



*Nú verður spennandi at vita um siglingin hjá Smyrli og hinum Strandfaraskipunum enn einaferð verður løgd lamin av eini ósemju um sáttmála. Tað fáa vit greiði á einaferð aftaná midnátt í annaðkvøld*

Og nú hava teir báðir semingsmenninir, Jógvan Amonsson og Alfred Petersen, kalla partarnir til samráðingar á miðdegi í dag.

Og so verður samráðst til tað røkkur ella støkkur.

Støkkur tað, fer tað at leggja strandferðsluna lamna, umframt at tað fer at raka almennar stovnar á landi, har maskinmeistarar arbeiða.

### Ósemjur um ymisk mál

Jógvan Nybo, formaður í Maskinmeistarafelagnum vil ikki siga so nógv um samráðingarnar, tí nú semingsmenninir eru komnir uppí, eru tað teir, sum føra orðið.

Men hann hevur áður sagt, at tað eru ymsar ósemjur, sum skilja partarnir.

Tað er eisini greitt, at ein av hesum ósemjunum er tann nýggi Smyril.

Fíggjarmálaráðið tvíheldur um, at sáttmálarnir hjá maskinmeistarunum, sum skulu við nýggja Smyrli, skulu viðgerast í hesum samráðingunum, men tað vil Maskinmeistarafelagið ikki.

Jógvan Nybo sigur, at partarnir avtalaðu seinasta summar ein leist fyri, hvussu farast skal fram undir samráðingunum.

Í tí sambandi av avtalað, at tað, sum samráðingarnar skuldi fevna um, skuldi gerast greitt, áðrenn samráðingarnar byrjaðu.

Tá ið hesar samráðingarnar byrjaðu, var onki krav frá Fíggjarmálaráðnum um nýggja Smyril. Tá var onki krav frá Fíggjarmálaráðnum um nýggja Smyril.

– Tað var ikki, fyrrenn vit høvdu havt einar átta samráðingarfundir, at Fíggjarmálaráðið setti eitt treytaleyst krav fram um, at sáttmalan hjá maskinmeistarunum við nýggja Smyrli, skuldi takast við í samráðingunum.

Men tað góðtekur Maskinmeistarafelagið ikki.

*Er tað ikki rætt at fáa semju um tann sáttmálarnar eisini, so at nýggi Smyril ikki endar sum Teistin og Brimil, ið báðir lógu í vikur av trætu um sáttmálarnar pørtum av manningini umborð?*

– Jú, men tað eru treytirnar við teirri skipan, sum vit hava ídag. Men skuldu vit samráðst um nýggja Smyril í hesum umfarinum, skuldi Fìggjarmálaráðið havt tikið hann við beinanvegin. At koma við nýggjum krøvum mitt í eini samráðing, er brot á avtalur, sum teir sjálvir hava gjørt. Tí hoyrir nýggi Smyril ikki við í hesum samráðingunum.

Men tað er ikki bara nýggi Smyril, sum skilir partarnar, sigur Jògvan Nybo, men útgreina tað nærri, vil hann ikki.

Tað hevur oftað verið tosað um, at bera so í bandi, at siglingin hjá Strandferðsluni skal ikki rakast av ósemjum av arbeiðsmarknaðinum.

Tað kundi gerast við at gera manningina til tænastumenn.

Men Jógvan Nybo sigur, at tað hevur hann enn ikki hoyrt eitt kis um frá tí almenna.

Honum hevði eisini hóvað ógvuliga illa at verðið gjørdu til tænastumann og at mist verkfalsrættin.

Sp/f Norðbil:

# Jákup keypt fimm Accordar í 22 ár

**Mikudagin 24. mars keypti Jákup Dam Jacobsen í Vestmanna sín fimta Honda Accord síðan 1982**

Nýggjasti Honda Accord er fimta generatiónin, síðan Accord fyrstu ferð komu á marknaðin, og Jákup hevur síðan havt ein av hvørjum modelli.

Tá Jákup mikudagin kom eftir bilinum fekk hann heilt óvæntað blómur frá bilasøluni Norðbil. Tá vit spurdu Jákup, hví hann hevur koyrt við júst sama bilmerki í so nógv ár, svaraði hann skemtiliga: Einaferð Honda- altíð Honda.




*Jákup Dam Jacobsen fær her blómur, tá hann heintaði bilin frá Norðbil. Á myndini eru f.v. Jákup Dam Jacobsen, og brøðurnir Frits og Birgir Dam Jacobsen frá Norðbil*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*


